

# Marcin til HB

Leingi hevur ljóðað fyri vist, at Marcin Dawid skal verja HB-málið komandi ár. Hetta bleiv váttað á HB-heimasíðuni í gjár. Bárður Johannesen, sum hevur vart HB-málið seinastu 8 árini, hevur boðað frá, at hann gevst við Formula-fótbólti, og tí var greitt, at nýggjur málverji skuldi finnast.

Hendan hevur HB so funnið í VB/Sumba. Marcin Dawid hevur seinnu árini prógvað, at hann avgjørt telist millum stinnastu málverjarnar í landinum, og hann átti sín avgjørda leiklut í, at VB/Sumba eisini skal spæla Formula fótbólt í næsta ár.

# Obi skal skora á Skála

Skála ítróttarfelag hevur gjørt sáttmála við Okeke Obele Onyebuchi. Obi, sum hann verður nevndur, kom í fjør til føroyskan fótbólt, og fyrsta árið var hann við til at tryggja B36 meistaraheitið. Ikki minst vísti hann seg sum ein framúr góðan innskiftara, og fleiri ferðir megnaði hann at toga antin eitt ella trý stig til felagið. Komandi ár verður tað tó á Skála, at nigerianski framherjin skal spæla. Árið í ár gekst ikki serliga væl, og í alt gjørdist talan bert um trý mál fyri B36, har hann aloftast var at síggja á beinkinum. Obi hevur í Serbia spælt undir nýggja Skála-venjaranum, Dragan Kovacevic, og hesin ivast ikki í, at nýggi maðurin verður ein styrkur fyri álopið á Skála.

# Battini funnin fram aftur



*Landskappingin í borðtennis byrjaði í vikuskiftinum. Stuttligt var at síggja enn eitt nýtt felag sum part av kappingini. B71 av Sandi var nevniliga við á fyrsta sinni.*

**Í vikuskiftinum fór borðtennis í gongd aftur, tá skipað var fyri kapping í Eysturskúlanum. Luttøkan var góð, og gleðiligt var at síggja nýggja borðtennisfelagið av Sandi luttaka á fyrsta sinni.**

BORÐTENNIS
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Um vikuskifti var hol sett á aftur landskappingina í borðtennis. Lagt var fyri í Eysturskúlanum í Havn har 1. Grand Prix umfar bleiv avgreitt. Um 70 luttakarar vóru møttir og má tað sigast at verða í lagi, tá ið hugsað verður um veðrið, sum var leygardagin. Helst vóru fleiri úr suðri og aðrastaðni frá, ið settist afur, tá ið tey hugdu út gjøgnum vindeygað leygarmorgunin.

Kappingin byrjaði klokkan tíggju, tá fyrstu fimm bólkarnir løgdu til brots. Sjálvt um fleiri leikarar enn vóru illa fyri, serliga av at hava siglt um Suðuroyarfjørð og Skopunarfjørð í ódnarveðrið, so sást hetta ikki á temum tí teir løgdu alla orku í fyri at vinna.

Klokkan eitt var síðani farið undir teir síðstu bólkarnar, og góðar tríggjar tímar seinni vóru teir seinastu bólkavinnararnir funnir, og so var klárt at gera støðuna upp.

Serliga stuttligt var at síggja enn eitt nýtt felag luttaka. B71 av Sandi hevði hesaferð fleiri leikarar við, og ætlanin hjá felagnum er at hava enn fleiri til næstu kappingarnar. Í fjør var felagið Royn eisini við aftur fyri fyrstu ferð eftir ein steðg í nøkur ár.

Kappingarnar gerast sjálvandi meir spennandi, tá fleiri feløg eru við í kappingunum, samstundis sum tað verður hugaligari og stuttligari hjá leikarunum at vera við og at kappast móti leikarum frá fleiri ymiskum plássum.

Oyggjaleikir verða á Rhodes næsta summar, so áhugavert verður at fylgja gongdini í kappingini, tí uttan iva verður kappingin ímillum leikararnar hørð um at sleppa við.

### Bólkavinnarar gjørdust:

| | |
|---|---|
| A: | Petur Niclasen, Tór |
| B: | Rói Agnarson, Tór |
| C: | Sheila Strøm, TBF |
| D: | Heini Mortensen, TBF |
| E: | Levi Winther, Tór |
| F: | Jónas Syderbø, Tór |
| G: | Tóki Thorsteinsson, Tór |
| H: | Margeir Kjærbo, TBF |
| I: | Andrias á Roykheyggi, Tór |
| J: | Árnfríður Olsen, Royn |

### Støðan í Grand Prix kappingini eftir 1. umfar:

| | | |
|---|---|---|
| **Smápinkur** | | |
| 1. Anna Mikkjalsdóttur | TBF | 180 stig |
| 2. Durita Jensen | TBF | 98 stig |
| 3. Sofía Maria Ferjá | TBF | 96 stig |
| **Smápiltar** | | |
| 1. Bjørgvin Sveinbjørnson | Royn | 82 stig |
| 2. Petur Muller | TBF | 80 stig |
| 3. Jónas Wentslau | TBF | 70 stig |
| **Pinkur** | | |
| 1. Lív Øster | TBF | 94 stig |
| 2. Sára Olsen | TBF | 92 stig |
| 3. Eva Wilhelm | TBF | 90 stig |
| **Piltar** | | |
| 1. Eyðfinnur Jensen | Royn | 150 stig |
| 2. Árnfríður Olsen | Royn | 80 stig |
| 3. Hans Højgaard | TBF | 74 stig |
| **Smágentur** | | |
| 1. Rakul Mikkjalsdóttur | TBF | 340 stig |
| 2. Birita Mortensen | TBF | 210 stig |
| **Smádreingir** | | |
| 1. Jákup Thomasen | TBF | 370 stig |
| 2. Jónhard Ferjá | TBF | 320 stig |
| 3. Páll Heri Nolsøe | TBF | 310 stig |
| **Gentur** | | |
| 1. Susie Midjord | TBF | 350 stig |
| 2. Sheila Strøm | TBF | 350 stig |
| 3. Joan Thomasen | TBF | 350 stig |
| **Dreingir** | | |
| 1. Fróði Jensen | TBF | 410 stig |
| 2. Rói Agnarsson | Tór | 400 stig |
| 3. Hallur Thorsteinsson | Tór | 390 stig |
| **Kvinnuunglingar** | | |
| 1. Marin í Dali | TBF | 400 stig |
| 2. Heidi Olsen | Tór | 200 stig |
| **Mansunglingar** | | |
| 1. Sigurð Carlsson | Tór | 450 stig |
| 2. Pætur Albinus | Tór | 430 stig |
| 3. Sjúrður Ferjá | TBF | 360 stig |
| **Meistaradeildin** | | |
| 1. Petur Niclasen | Tór | 500 stig |
| 2. Ragnar Egilsson | Tór | 470 stig |
| 3. Jóan Petur Holm | Tór | 380 stig |

# Fram kann leggja seg á odda

**Fram kann við sigri leggja seg á odda í meistaradeildini saman við ÍF, meðan Nøvan enn roynir at vinna sítt fyrsta sett í meistaradeildini**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

ÍF og Fram eru einastu ósigraðu liðini í meistaradeildini hjá monnum. Munurin á liðunum er bara tann, at ÍF hevur leikt tríggjar dystir, meðan Fram bert hevur leikt tveir.

Mikukvøldið er aftur ein dystur á skránni í meistaradeildini hjá monnum, tá Fram tekur ímóti botnliðnum Nøvuni. Fram hevur vunnið báðar sínar dystir í ár, og tí mugu teir metast sum stórfavorittar ímóti Nøvuni. Nøvan hevur enn ikki vunnið eitt sett í bestu deildini, eftir at teir í fjør gjørdust partur av meistaradeildini hjá monnum. Teirra fyrsta mál í ár er at vinna eitt sett, og tí er ólíkt, at teir kunnu gera nakað við Fram í kvøld.

Við einum sigri kann Fram leggja seg undir liðuna á ÍF í oddinum, og um ella tá hetta hendir, so eru heili fýra stig niður til nummar trý í deildini.

Dysturin millum Fram og Nøvuna er í Hoyvíkshøllini, og hann byrjar kl. 19.00 í kvøld.